BAKKA FROST

## Handverkari til Kassavirkið

Vit søkja dugnaligan handverkara til kassavirkið. Kassavirkið framleiðir styrporkassar til feskfiskaútflutning.

Talan er um varandi arbeiði.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Bakkafrost, tlf 405000.

Bakkafrost samtakið rekur alt virksemi í Norðoyggjum og Suðureysturoy í felagnum Faroe Salmon. Framleiðslueindirnar eru á 3 smoltstøðum og 7 spjaldvalastøðum umframt á kryvjivirkinum í Klaksvík og portiónsvirkinum á Glyvrum. Okkara vøruúrval er breitt innan fyri laksavørur, men høvuðsfokusumráðið er innan vørur til retailmarknaðin serliga í ES. Talið á starvsfólkum er 160.

**P/F Bakkafrost** FO 625 Glyvrar Faroe Islands Tel: +298 40 50 00 Fax: +298 40 50 09 bakkafrost@bakkafrost.com



Lesið

Sosialin

-so eru tit við!






## SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaradeildina at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

· Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
· Skráseting av akførum
· Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
· Eftirstøðumál
· Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **4. juni 2007**.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo



## Tangabilførari í Tórshavn

**Søkt verður eftir tangabilførara til ein av okkara tangabilum í Tórshavn.**

**Starvið**
Starvið er at veita kundum okkara tænastu á hægsta stigi.

**Arbeiðið umfatar:**
• Í fyrsta lagi koyring í Tórshavn.
• Í øðrum lagi koyring á meginøkinum.
• Í triðja lagi annað arbeiðið í samband við oljuúrdráttir.

**Vit bjóða**
Eitt støðugt arbeiðið, har persónurin kemur at vera ein partur av verandi arbeiðstoymi hjá Statoil í Tórshavn og aðrastaðni runt landi. Starvsfelagin vit leita eftir, skal verða ágrýtin, kunna arbeiða sjálvstøðugt og seta kundans tørv í fyrstu røð.

**Førleiki**
Tað er ein treyt, at tú hevur tað stóra koyrikortið og at tú hevur royndir at koyra stórar bilar.

Latin verður mánaðarløn samb. galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Magna Dybczak rakstrarleiðara, ella Andrias Mikkelsen goymsluleiðara á tlf. 343500

Skrivlig umsøkn verður at senda til:

**P/F Statoil Føroyar**
Rakstrardeildin
Vestara bryggja 2
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

innan 25 mai 2007.

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða um 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.

STATOIL